ATLANTIC AIRWAYS

2017 EUROPEAN CHAMPIONSHIP

HM í flogbólti 23.–25. mai 2016

TÓRSHAVN, FAROE ISLANDS

Official foreword by

Aleksandar Boričić
CEV President

Dear Volleyball friends,

There is a lot of excitement and anticipation ahead of the upcoming qualification round for the 2017 edition of the CEV Volleyball European Championship – Small Countries Division since it also coincides with the start of the qualifying process for the 2018 FIVB Men's and Women's World Championships that will be taking place in Italy/Bulgaria and Japan, respectively.

This means that a lot is at stake when Luxembourg, Iceland and the Faroe Islands play host to these tournaments where not only a spot in next year's Final Round of the SCD competition will be up for grabs but also a ticket to the next round of the qualification process for the world's premier Volleyball event.

This also testifies that the Small Countries are becoming more and more involved into the activities of our Volleyball family and their players will be able to measure up their skills against some of the more established teams in Europe.
Waiting for the competition to start and wishing a very good preparation phase to all teams, I would like to express my gratitude to the National Federations who are playing host to these tournaments.

Thanks to the local organisers, the many volunteers and everyone involved in the delivery of this competition for providing the SCD's Volleyball family with yet another opportunity to feel what it is like to be competing at the international level.

Wishing the very best of luck to all participating teams, I remain,

Sincerely yours,

Aleksandar BORIČIĆ
CEV President

Flogboltssamband Føroya
Postboks 1021
FO-110 Tórshavn
Tel. 31 87 66 / 21 87 66
Fax 31 24 21
fbf@fbf.fo · www.fbf.fo

Umbróting, prent og liðugtgerð:
Pf. Føroyaprent
Tel. 31 45 55
www.foroyaprent.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

Nøkur børn og ung uppliva harðskap – og tað er ongantíð í lagi!

Harðskapur kann vera likamligur, sálarligur og kynsligur.

Kennir tú onkran, sum er fyri harðskapi?
Ert tú fyri harðskapi heima ella aðrastaðni?
Er sjeikurin harðligur? Er daman harðlig?
Unnustuharðskapur kann eisini vera, um onnur vilja ráða yvir tær ella hava eftirlit við tær alla tíðina.

At nýta harðskap er **IKKI** í lagi!

Harðskapurin hvørvur bert, tá vit tosa um hann. So ert tú fyri harðskapi – ella kennir tú onnur, sum eru – tosa so við onkran um trupulleikarnar. Tað er ikki skomm.

Sig frá – tosa við eitt vaksið fólk, tú hevur álit á! Tosa við foreldrini, við vinfólkini ella teirra foreldur. Í skúlanum eru fleiri vaksin fólk, tú kanst venda tær til við tínari stúran ella spurningum. Tosa við flokslæraran, SSP-læraran ella heilsufrøðingin á skúlanum.

Tú kanst eisini altíð venda tær til Barnaverndartænastuna í tínum øki. Adressuna finnur tú á bvs.fo.

Tú ert ikki einsamøll ella einsamallur – minst til tað!

Hentar telefonir og heimasíður

Barnabati **310960**, *barnabati.fo*
Gigni **562300**, *gigni.fo*
Løgreglan **351448**, *politi.fo*
Alarmsentralurin **112**
Kvinnuhúsið **317200**, *kvinnuhusid.fo*
eg.fo, bvs.fo

Føroyskur flogbóltur ongantíð verið sterkari!

Tað er næstan sum í ævintýrinum, tá ið spegilin á vegginum har fær spurningin, „hvør er vakrast í kongsríkinum?“. Spurdu vit nú spegilin „hvør er best í kongsríkinum“ var svarið: „Tað ert tú Danmark, men ansa tær, tí Føroyar fara at taka teg!“

Hetta er søgan um góð evni, ídni, gott arbeiði í flogbóltsfeløgunum, væl skipað og miðvíst ungdómsarbeiði og A-landsliðsarbeiði í Flogbóltssambandinum og føroyskar leikarar í bestu donsku deildunum. Alt tað til samans hevur gjørt, at vit føroyingar kunnu siga, at vit nú eiga eitt A-landslið hjá kvinnum, sum er á stigi við danska A-landsliðið. Og vit eiga besta leikaran í kvinnuflogbólti í øllum kongsríkinum. Hon er Sofía Purkhús, og hon er á vøllinum saman við øllum hinum fantastisku kvinnunum hjá okkum.

Øll árini síðan stovnanina í 1980, hevur Flogbóltssamband Føroya lagt seg eftir at hava miðvíst landsliðsarbeiði. Frá teimum smáu til tey eldru. Á Oyggjaleikum, í Norðurlendskum kappingum og í EM-kappingum, har vit nú eisini hava U19 og U20 landslið. Altíð við dreyminum og dirvinum at skipa fyri í Føroyum.

Tað er hetta støðuga altjóða virksemið, sum hevur sín stóra leiklut í úrslitunum. Og gloymið ikki, at vit á yngru liðunum hava fleiri leikarar, sum við tíðini og røttu umstøðunum kunnu røkka enn longur.

Flogbóltsfamiljan í Føroyum er sera sterk, men politiski myndugleikin má raðfesta atljóða virksemið hjá allari føroysku ítróttini serstakt og hægri enn nú. Vit høvdu í 2015 serstaka altjóða pulju, sum kom ómetaliga væl við – serliga hjá teimum, ið tá skipaðu fyri kapping í Føroyum. Tað eru slíkar skipanir, ið eru neyðugar, so tað gerst møguligt áhaldandi at vera við á altjóða stigi og ikki minst bjóða kappingar sum hesa og tær í fjør fram her í Føroyum. Tí tað er drúgt og dýrt at vinna seg fram ímillum tey bestu, men tað er bæði stríðið og pengarnar vert. Serliga, tá ið vit nú kunnu leika á heimavølli, og vit merkja gleðin hjá leikarum og avvarðandi og tann holla stuðul, vit fáa innanhýsis og frá kommunum og hollum stuðlum.

Eg takki tykkum øllum somlum hjartaliga – tað ber bara til, tá ið vit eru nógv, ið ganga saman um tað.
Koyrið á Føroyar!

Flogbóltssamband Føroya
Magnus Tausen
formaður

Heildarloysnir frá Articon



Eitt trygt grundarlag

Articon hevur serligan førleika innan jørð-, kloakk-, betongarbeiði, byggibúgving, vega- og havnagerð, fjarhita, timbur- og snikkara-arbeiði eins og ymisk apteringsarbeiði, tá skip verða bygd ella umvæld. Men vit kunnu standa fyri ella vera partur av so at siga øllum verkætlanum ella byggiarbeiði so sum skrivstovubygningar, verksmiðjubygningar, goymsluhallir, umvæling og umbygging.

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

Heðin Mortensen
Borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu

Altjóða flogbóltur í tríggjar dagar

Í tríggjar dagar á rað er ítróttarhøllin á Hálsi í Havn karmur um altjóða kapping í kvinnuflogbólti, har landsliðini hjá Kýpros, Írlandi, Liktinstein og Føroyum fara at kappast um í fyrsta lagi eitt pláss í EM-kappingini og í øðrum lagi eitt pláss í HM-kappingini. Við øðrum orðum skuldi ikki skortað við motivatión, nú vit í veruleikanum hava tvær kappingar í einari.

Har er tað so, at tvey tey fremstu liðini av hesum fýra sleppa víðari í EM-kappingini, meðan tað fremsta eisini sleppur víðari í HM-kappingini. At føroyska kvinnulandsliðið kann vera væl við, fingur vit ábendingar um, nú flogbóltskvinnurnar vóru um reppið at koppa teimum donsku í vinardysti niðri, har fimm sett máttu til, áðrenn Danmark var sloppið við skrekkinum.

Í aðrar mátar ber so eisini til at siga, at føroyskur flogbóltur longu hevur vunnið fyrsta settið, nú tað aftur er eydnast Flogbóltssambandinum at fáa eina altjóða kapping til Føroya, tí ikki skerst burtur, at aftan fyri tað liggur hart arbeiði og snildi, tí slíkar kappingar koma ikki av sær sjálvum hendavegin. Og fyri okkum í Havnini hevur tað eisini nógv at siga, at vit sum vertsbýur kunnu vera við til at bjóða okkum fram í sambandi við kappingar og tiltøk í altjóða høpi.

Tað er okkum ein gleði og æra at sleppa at hýsa hesi EM/HM-kappingini í høllini á Hálsi, sum vit nú eisini fara at brynja enn meira út til slíkar størri uppgávur. Vit gleða okkum til hesar tríggjar dagarnar við tilsamans seks altjóða dystum, samstundis sum vit sjálvandi vóna, at væl hilnast hjá okkara flogbóltskvinnum. Uttan fyri vøllin vilja vit vísa okkara allarbesta gestablídni, men kunnu ikki lova, at vit á vøllinum fara at lata serliga nógv frá okkum.

Góða kapping, øll somul, og hjartaliga vælkomin!

Heðin Mortensen
borgarstjóri

Vit vinna!

Koyr á **Føroyar!**

Helena Dam á Neystabø,
Forkvinna í Mentamálanevnd
Tórshavnar Býráðs

Okkara flogbóltsspælarar hava í mong ár gjørt vart við seg altjóða – bæði í oyggjaleikahøpi og nú eisini í EM/HM undankappingum. Ikki minst hava okkara U-19 lið borðreitt við óvæntaðum og góðum úrslitum. Í síðstu viku tók kvinnulandsliðið øll á bóli, tá ið tær mundu vunnið ein dyst móti danska kvinnulandsliðnum í flogbólti. Tað var bert við tí ytstu av naglunum, at donsku kvinnurnar hálaðu seinastu bóltarnar heim í 5. og avgerandi settinum. Flott kvinnur!

Og ikki at gloyma, tann stóra týdning, sum føroyskir leikarar hava á teimum sterku liðunum í donsku landskappingini. So stóran, at til dømis Sofía Purkhús í ár varð kosin besti leikari í donsku flogbóltskappingini. Tað ber prógv um, at gott varð lagt í beinið, og at okkara leikarar eru bæði dugnaligir og álítandi.

Havnin spílar seg út

Tað var í januar í ár, at Flogbóltssambandið vendi sær til Evropeiska flogbóltssambandið og bjóðaði seg fram at vera vertur fyri einari av EM/HM undankappingunum. Tórshavnar Kommuna játtaði sjálvsagt at vera vertsbýur, og saman við Flogbóltssambandinum at tryggja, at allar kringumstøður liva upp til treytirnar, sum verða settar til altjóða flogbóltskappingar. Tað hevur verið roynt fyrr í 2008. Og vit vóru ógvuliga spent, um tað fór at eydnast, og glað, tá ið boðini komu. Tað er gott fyri flogbóltin, tað er gott fyri Føroyar.

Og tað er sjálvsagt, at Havnin sum okkara høvuðsstaður spílar seg út, og tekur ábyrgd. Tað er harafturat lætt, tá ið man samstarvar við so professionella skipan sum Flogbóltssambandið.

Vælkomin til gestirnar úr Írlandi, Liktinstein og Kýpros

Vegna mentamálanevndina í Tórshavn vil eisini eg bjóða øllum okkara gestum úr Írlandi, Liktinstein og Kýpros at vera hjartaliga vælkomin til Havnar.

Megna okkara kvinnur at vinna kappingina koma Føroyar víðari í bæði HM og EM kappingini, verða okkara kvinnur nr. 2, koma Føroyar víðari í EM kappingini. So her er spenningur fyri allar pengarnar.

Vinir, sum kappast!

Koyr á Føroyar. Vit stuðla tykkum treytaleyst. Vit vóna, at allir dystir verða spældir í besta fair-play anda.

Eitt av høvuðsendamálunum við altjóða ítróttarkappingum er at møtast á vølli, knýta nýggj vinabond tvørturum landamørk. At vit minka um gjáir og ósemjur landanna millum, og minka um mismunir millum fólkasløg.

Góða eydnu og takk fyri eitt fantastiskt tiltak.

VÁGA KOMMUNA – EIN KOMMUNA Í MENNING

VÁGA KOMMUNA SETUR TRIVNAÐ OG UMHVØRVI Í HÁSÆTI

VÁGA KOMMUNA

– ALTÍÐ VERD EINA VITJAN

- Kálvalíð
- Krígssavnið
- Kaminan í Vatnsoyrum
- Lakeside
- Sandavágs Kirkja
- Miðvágs Kirkja
- Minnisvarðin yvir Hammershaimb
- Minnisvarðin yvir Jens Paula Heinesen
- Minnisvarðin yvir Mikkjal á Ryggi
- Gøtan út til Trøllkonufingur
- Gongutúrur til Bøsdalafoss
- Gongutúrur til Fjallavatn
- Gongutúrur til Presttanga
- Gongutúrur til Slættanes

GISTAST KANN Á VALLARAHEIMINUM Á GILJANESI



Vága kommuna
Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur
Tel: (+298) 34 44 00
Fax: (+298) 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

VÁGA KOMMUNA

Altjóða pallurin **í Føroyum**

Rigmor Dam
Landsstýriskvinna

Sum landsstýriskvinna í ítróttamálum gleðir tað meg, at Føroyar aftur í ár koma á ítróttarliga heimskortið, nú tað hesa ferð er altjóða flogbóltur, ið verður hýstur í Føroyum. At fáa heimin til Føroyar, eigur at vera okkara fremsta mál. Í ítrótti, í mentan, í hugna og gaman. Okkum tørvar sum tjóð at ganga saman um hesi stóru tiltøk, tí hóast vit er fá, so hava vit í allar mátar evnini.

Vit hava ferð eftir ferð sæð ítróttafólk okkara vísa framúr úrslit á altjóða pallinum. Í Kristu Mørkøre og Pál Joensen eiga vit svimjarar, sum dystast í OL. Hondbóltslandslið eru nú aftur regluliga í kapping og á Oyggjaleikum verður mangt heiðursmerkið borið heim við aftur – líka mikið hvør ítróttagreinin er. Og so er at nevna fótbóltslandsliðið, sum í seinastuni eisini hevur havt framúr úrslit at vísa á. Á altjóða ítróttapallinum standa Føroyar sterkar.

Men einki kann hóast alt hetta metast við at hava altjóða pallin í Føroyum. Í fjør upplivdu vit stórfingna rómin, tá ið U17 kapping var í hondbólti, men serliga, tá ið HM í estetiskum fimleiki var fyriskipað, og føroysk lið stóðu seg væl. Vit prógva ferð eftir ferð, at fáa vit møguleikan, so duga vit at skipa fyri, og vit standa okkum eisini leikliga.

Nú eru tað fremstu flogbóltskvinnur okkara, ið sleppa at trína pallin. Tær hava verið í hvørjari finalu á Oyggjaleikum síðani gullið í 1999 á Gotlandi. Og oftast hava tær vunnið. Tær hava staðið stinnar í EM-kapping, og herfyri góvu tær danska A-landsliðnum harðastu kapping. Men felags fyri øll hesi framúr úrslit er, at tey hava verið í útlondum. Ikki síðan EM var her seinast í 2008, hava føroysku kvinnurnar átt heimavøll. Endiliga kunnu vit síggja tykkum aftur her í Føroyum.

Vit vóna øll, at tit okkara fremstu flogbóltskvinnur geva okkum uppliving, vit ongantíð fara at gloyma. Allar bestu eydnu í kappingini ynski eg tykkum, og samstundis ynski eg gestum okkara alt tað besta og vóni, at tit altíð fara at líta aftur á hesa ferð tykkara til Føroyar við gleði.

HETTA ERU BÚMERKI
SENDISTOVAN
#HETTA KUNNU VIT EISINI GERA FYRI TEG
ÍTRÓTTA HÁSKULÍN
ASIR
HAVN COLLEGE
SÁ
1994

FAROE ISLANDS

Captain
Eina Kalsø

Coach
Jóhan Petur á Stongum

Assisent coach
Kristian Mikkelsen

Physiotherapist
Klæmint Isaksen

Team Leader
Teresa Fjallsbak

Shirt no	Name	Height	Years	Position	National games
1	Femja Fróðadóttir Mortensen	164	21	Libero	10
2	Birgit Guttesen	178	25	Opposite	46
3	Anna Sára Leifsdóttir Skaalum	172	24	Outside-Hitter	0
4	Urd Tormóðsdottir Traðará	179	23	Middle Blocker	21
5	Súsanna Ludvig	183	19	Middle Blocker	0
6	Sóley Poulsen	180	26	Middle Blocker	25
7	Guðrun Simona L. Joensen	163	24	Setter	15
8	Eina Stephania Kalsø	170	25	Setter	31
9	Anja Sonnadóttir Danielsen	181	23	Outside-Hitter	34
10	Ruth Albinsdóttir	169	27	Outside-Hitter	12
11	Elisabeth Purkhús	180	25	Middle Blocker	13
12	Sofía Purkhús	180	23	Outside-Hitter	31
13	Hanna Andriasdóttir Olsen	181	22	Outside-Hitter	0
14	Eyð Guðrunsdóttir Magnussen	175	24	Libero	11

SØRVÁGS KOMMUNA
STUÐLAR FLOGBÓLTINUM

Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur • www.sorvag.fo

CYPRUS

Captain
IORDANOU Antri

Coach
PATSIAS Petros

Assisent coach
PANAYIDES Costas

Team Leader
ANDREOU Franklinos

Shirt no	Name	Height	Years	Position
2	KOLOKOTRONI Marina	190	14	Opposite
3	LEONIDOU Evita	171	15	Libero
5	DEMETRIOU Emilia	180	16	Outside-Hitter
6	KOLOKOTRONI Eleni	180	16	Outside-Hitter
7	LAMPROU Katerina	177	18	Middle – Blocker
8	ZAKCHAIOU Katerina	184	18	Middle – Blocker
9	STYLIANOU Rania	172	15	Outside-Hitter
10	HADJICHRISTODOULOU Aspasia	173	19	Opposite
11	MOSFILIOTI Elena	172	25	Libero
13	IORDANOU Antri	181	28	Middle – Blocker
14	LEONIDOU Ioanna	173	20	Setter
17	SPYROU Nikolina	173	18	Setter

TVØROYRAR KOMMUNA
Við ynskjum um eina góða EM- og HM-undankapping og bestu eydnu til føroyska landsliðið
Á Tvøroyri er ítrótturin í fremstu røð

IRELAND

Captain
Olivia Molloy

Coach
Willem Roosenburg

Assisent coach
Adam Wong
Fabio Tamborrini

Team Leader
Jennifer Moret

Shirt no	Name	Height	Years	Position
1	Alice Linehan	174	17	Outside-Hitter
2	Sarah Benn	185	20	Middle Blocker
3	Mary Creaton	172	17	Setter
4	Olivia Molloy	174	24	Middle Blocker
5	Aoibhin Cassidy	182	20	Middle Blocker
6	Orla Lynch	177	21	Opposite
7	Regina Halpin	169	24	Setter
8	Roisin Roantree	163	20	Libero
9	Edel Nolan	176	24	Outside-Hitter
10	Karen Benn	185	20	Outside-Hitter
11	Eimear O'Neill	179	16	Outside-Hitter
12	Cora Moloney	172	17	Opposite
13	Roisin Allen	168	29	Libero

YVIRRASKANDI

ORGINALITETUR

ALTJÓÐA

NÆRLEIKI

KREA

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

fuglafjordur.fo

LIECHTENSTEIN

Captain
KAISER Ramona

Coach
DEMMER Marc

Assisent coach
VAN DER HELM Bianca

Physiotherapist
LENHERR Selina

Team Leader
BLANK Alois

Shirt no	Name	Height	Years	Position	National games
2	GRABMAYER Daniela	174	20	Middle-blocker	24
4	KAISER Sandra	169	30	Libero	57
5	KAISER Ramona	164	26	Outside-Hitter	63
6	BOSS Christina	178	16	Outside-Hitter	39
7	SCHIFFERLE-WALSER Petra	177	33	Opposite	59
8	EPPLE Tatjana	172	24	Setter	51
9	HEMMERLE Vanessa	164	17	Outside-Hitter	39
12	MEIER Melanie	165	23	Middle-blocker	36
18	HASLER Claudia	171	30	Outside-Hitter	69

KREA

NES KOMMUNA
stuðlar ítróttina

NES KOMMUNA
Ein kommuna fyri øll

TRIVNAÐUR | ÁBYRGD OG ÁLIT | MENNING

klaksvíkar kommuna

KLAKSVÍK

VÆLKOMIN

Klaksvíkar kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32 | Postboks 2 | 710 Klaksvík | Tlf. 41 00 00 | klaksvik@klaksvik.fo | www.klaksvik.fo

trygging.fo
VANLUKKUTRYGGING
Fyrivarin
heldur enn
eftirsnarin
Set teg í samband við okkum á telefon 345 600 ella tf@trygging.fo og tekna vanlukkutrygging.
Betri pensjón
TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

SKORA
VIÐ SISU
SISU
Föroya Bjór

Snýr tað seg um tína framtíð?

Vilt tú royna tínar veingir, hevur tú tørv á einum smidligum fíggjarlívi.



sansir.fo

Kom og fá eitt prát við okkum

Eik Banki P/F, Tel. 348000
eik@eik.fo , www.eik.fo

Eik

Tað snýr seg um teg

Sertilboð

TIL ELLA ÚR KRETA

KRETA - VÁGAR 27. JUNI ella
VÁGAR - KRETA 25. JULI

Einvegis flogferð, fyri hvønn bara

1.175,-

Íroknað skattir og ferðaavgjøld

Nú kanst tú flúgva av Kreta til Vágar tann 27. juni ella úr Vágum til Kreta tann 25. juli fyri bara 1.175 kr. fyri hvønn. Góðir møguleikar eru at ferðast hinvegin umvegis eitt nú Keypmannahavn ella Edinburgh.

Á Kreta er stórsligin náttúra, góður matur, ein rúgva av mentan og summar og sól so gott sum alt árið.

Har kunnu tit ganga í fjøllunum, vitja ótrúligar gjáir og stíga niður í djúp, yvirnatúrlig helli. Ella bara taka tykkum av løttum á strondunum, vitja góðar matstovur og barrir, sum borðreiða við eksotiskum mati og drykkjum allan sólarringin á tamb. Á Kreta kunnu tit njóta frítíðina til fullnar.

Bílegg ferðina nú á **atlantic.fo** ella á tel. **34 10 00**

Á www.atlantic.fo ber eisini til at bíleggja hotell og bil afturat flogferðini.

ATLANTIC AIRWAYS

Atlantic Airways Tel 34 10 00 www.atlantic.fo